# Atlantic Petroleum keypt bretsk oljufelag

**OLJUVINNA Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum skrivaði leygardagin undir keypssáttmála um at keypa allan partapeningin í bretska oljufelagnum Volantis Exploration Limited**

Eirikur Lindenskov

Volantis Exploration hevur ognarpartar í 15 loyvum í syðra partinum av bretska norðsjónum, og millum ognirnar eru gassleiðirnar Fulham og Pegasus. Centrica er fyristøðufelag á 9 av teimum 15 loyvunum. Afturat verandi loyvum hevur Volantis søkt um loyvir í bretskum og hollendskum øki, hesar umsóknir hava myndugleikarnir ikki avgreitt enn.

Keypið ber eisini í sær, at Atlantic Petroleum eftir ætlan í summar skal luttaka í einum leitingarbrunni á Foxtrot prospektinum, sum liggur í bretskum øki. Fyristøðufelag er Tullow Oil og ognarparturin hjá Atlantic Petroleum verður 35%.

Seks av starvsfólkunum hjá Volantis Exploration fara framyvir at starvast hjá Atlantic Petroleum, harímillum stjórin Nigel Thorpe, ið verður menningarstjóri í Atlantic Petroleum.

Við keypinum fer talið av leitiloyvum hjá Atlantic Petroleum úr 14 upp í 29, og felagið samstarvar nú við 27 altjóða oljufeløg.

– Vit eru sera fegin um keypið av Volantis Exploration, og vit síggja fram til samstarvið við Centrica, Tullow. SEQ og GDF í syðra partinum av Norðsjónum. Volantis Exploration hevur uppbygt eina sera góða portefølju av leitingar- og metingarloyvum, og vit gleða okkum til at arbeiða víðari við møguleikunum í hesum loyvunum. Starvsfólkini frá Volantis Exploration geva holla vitan og royndir til Atlantic Petroleum, og hetta verður ein týðandi liður í okkara víðari arbeiði, sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum.

– Vit fegnast um keypið hjá Atlantic Petroleum. Samansetingin av loyvum og førleikum hjá feløgunum báðum er eftir okkara metan eitt gott grundarlag fyri at seta ferð á víðari vøkstur hjá Atlantic Petroleum, siga stjórarnir í Volantis Exploration, Nigel Thorpe, Andrew Mortimer, David Marsden og Alex Strong, stjórar í Volantis Exploration.

Keypsprísurin fyri Volantis Exploration verður upp til 8 milliónir pund ella slakar 70 milliónir krónur.



*Løgtingið hevur við aðru viðgerð samtykt at stuðla Saltsilo-ætlanini, men spurningurin um lønina hjá oddamanninum Ólavi Rasmussen hongur í leysari luft*

# Ógreiða um lønina

**Skal Ólavur Rasmussen hava lønina nú frá Tvøroyrar kommunu fyri arbeiðið við Saltsiloni, skal peningurin mótroknast fráfaringarlønini sum prestur**

Randi Jacobsen

Fíggjarmálaráðið vil hava nærri at vita um lønina, sum Tvøroyrar býráð ætlar at lata Ólavur Rasmussen fáa fyri arbeiði sítt við Saltsiloni.

Tí hevur Fíggjarmálaráðið biðið kommununa koma við nærri upplýsingum um málið. Umbønin varð ikki send kommununi fyrr enn hósdagin í seinastu viku, og tí er svar ikki komið enn.

Kristin Michelsen, borgarstjóri í Tvøroyrar kommuni heldur, at málið er einfalt, og hann sigur, at kommunan einki hevur at krógva.

- Vit hava eina býráðssamtykt, sum sigur, at Ólavur Rasmussen skal fáa 50.000 krónur um mánaðin í eitt ár. Meira er ikki um tað, sigur Kristin Michelsen.

## Lønin bíðar

Hóast samtyktin er gjørd, hevur kommunan enn ikki goldið Ólavur Rasmussen nakra løn fyri arbeiðið við Saltsiloni.

Tað bíðar, til øll fíggingin er komin í hús.

Kristin Michelsen sigur, at kommunan enn ikki hevur tosað nærri við Ólav Rasmussen um lønina. Hann veit ikki, um Ólavur Rasmussen vil hava lønina, um hon skal mótroknast fráfaringarlønini, ið hann fær frá Mentamálaráðnum.

Hálvan januar í fjør varð fráfaringaravtala gjørd millum Mentamálaráðið og Ólavur Rasmussen, og sambært hesi avtalu skal fyrrverandi presturin, sum var tænastumaður, hava løn í trý ár fram til 2013.

## Kann ikki bíða

Tvøroyrar kommuna kann ikki bíða við at gjalda Ólavi Rasmussen lønina, til fráfaringaravtalan er úti. Sambært roknskaparreglunum skal lønin útgjaldast í sama roknskaparári, sum arbeiðið verður gjørt.

Tað hevur ikki eydnast í dag at fáa nakra viðmerking frá Ólavi Rasmussen.